## Friðargonga fyri Gaza

Í óveðrinum leygardagin savnaðust eini 60 fólk í Havn fyri friði í Gaza. Gingið var úr Gundadali og oman í Mettustovu á Reyni, har Tinganest framførdi nøkur løg og Elisabeth Olsen flutti fram røðu. Ein av stigtakarunum til friðargonguna var Helgi Gudmundsson, sum var vælnøgdur við tiltakið. Hann hevði fingið hugskotið úr Íslandi, har kallað varð inn til friðargongu yvir Facebook. Eisini í Føroyum varð tiltakið lýst yvir Facebook og síðani í útvarpinum. Luttakararnir tóku hvørki partí við Ísraelar ella Palestinar, men ynsktu at friður skal aftur valda í økinum.



## Farmaskip rendi á Smyril

Fríggjakvøldið um midnáttartíð rendi farmaskipið Celia á Smyril, sum lá við kei í Havn. Tað var nakað av vindi, tá Celia, sum siglir fyri Faroe Ship, kom inn móti og skuldi leggja seg frammanfyri Smyril. Av Havnarskrivstovuni verður sagt, at tá hann svingar inn móti keikantinum, kemur hann ov nær og gelendarin har afturi tekur í gronina á Smyrli. Úrslitið er, at Celia brestir inn móti keikantinum undir Havnarskrivstovuni. Ongin álvarsligur skaði hendi, men bæði Smyril og keiin fingu smærri snuddir og farmaskipið fekk eina buglu. Politiið og Skipaeftirlitið skulu nú taka støðu til, um meira verður gjørt við málið.

# Loysn til sjúkrahúsið má finnast beinanvegin


Sosialurin
Nr. 5 • Hósdagur • 8. januar 2009 • 83. árg. • Kr. 20,00
fólk fylla sjúkrahús Síða 7
Útisetar kunnu fáast heimaftur Síða 2
Lisbeth Nebelong: Góð sparíráð í kreppuni Síða 6
LEIÐARI RÝMIR UNDAN KAOS

*Hósdagin í seinastu viku skrivaði Sosialurin um, at Landssjúkrahúsið hevur ein so stóran trupulleika av frískum fólkum á staðnum, at ein leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur segði seg úr starvið, tí hon ikki kundi liva við støðuni. Hans Pauli Strøm heldur, at ein loysn má finnast beinanvegin*

**Hans Pauli Strøm, heilsumálaráðharrin, leggur stóran dent á, at støðan á Landssjúkrahúsinum er ótolandi, og tí má ein loysn finnast beinanvegin. Orsøkin til hetta, er, at umbyggingar skulu fara í gongd á Landssjúkrahúsinum tíðliga í vár, og tá má hesin trupulleikin við frískum á sjúkrahúsinum vera loystur**

HEILSUVERK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Landssjúkrahúsið eigur ikki at hava til uppgávu at røkja frísk fólk. Hetta er ein ólukkulig støða, sum vit mugu loysa sum skjótast, sigur Hans Pauli Strøm. Hann greiðir somuleiðis frá, at heimarøktin hevur havt ein trupulleika at fáa neyðugu játtanina.

- Tey arbeiða alla tíðina. Alt døgnið, hvønn dag í árinum. Men tá mann tosar um fíggjarlóg sær mann, at heimarøktin hevur fingið eina og tepra játtan, metir Hans Pauli Strøm. Hann leggur afturat, at hann á ongan hátt fer at siga, at Rósa Samuelsen ikki hevur verið nóg røsk at útvega sær pening.

### Ein ónd ringrás

Hans Pauli Strøm metir, at mann er í einari óndari ringrás, sum ger støðuna á Landssjúkrahúsinum ótolandi.

- Hetta er ein stórur trupulleiki, sum hevur ótolandi fylgjur fyri øll, sum eru innvolveraði í málinum. Har meini eg eisini við tey avvarðandi, sum ikki vita síni livandi ráð í hesi vanlukkuligu støðu, sum bara er vorðin verri, síðan barakkin varð afturlatin, staðfestir Hans Paulis Strøm.

### Sjúkrahúsið gjørt sítt

Fyrr hevur Nærverkið leiga seg inn í barakkina fyri fimm milliónir um árið, men frá 1. januar í ár, gavst hetta samstarv.

- Landssjúkrahúsið hevur latið tær fimm milliónirnar aftur til Nærverkið, og tað skal alt annað líka betra um støðuna hjá Nærverkinum, vísir heilsumálaráðharrin á. Hann leggur afturat, at afturlatingin av barakkini hevur gjørt trupulleikan enn verri, har mann misti hesi tíggju plássini, sum vóru í barakkini.

Somuleiðis vísir hann á, á sama hátt sum øll onnur í málinum, at barakkin ikki kann latast uppaftur, tí hon skal nýtast til onnur endamál, tá umbyggingin av Landssjúkrahúsinum fer í gongd í vár.

### Kendi til trupulleikan

Hans Pauli Strøm greiðir frá, at Landssjúkrahúsið gjørdi vart við henda stóra trupulleika fyri jól, men tá var ikki møguleiki at taka málið upp, tí fíggjarlógin var fyri. Men hann sigur seg skula á fund við sjúkrahúsið í morgin, har mann skal tosa um ymiskar møguleikar fyri útslúsing av liðugtviðgjørdum sjúklingum, tí trupulleikin hjá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum er, at ongin er at taka ímóti hesum liðugt viðgjørdu sjúklingunum. Tí serliga Suðurstreymur manglar røktarheimspláss.

- Í fyrstu syftu mugu vit finna útav, hvørjir møguleikar eru, men tað er eyðsýnd, at ein loysn má finnast beinanvegin. Evsta mark er tá umbyggingin av Landssjúkrahúsinum fer í gongd, men hetta eigur ikki at taka so langa tíð, sigur Hans Pauli Strøm.

### Mugu finna útav onkrum

- Eg og Rósa Samuelsen mugu syrgja fyri, at ein loysn verður funnin, tí vit hava skyldur mótvegis okkara borgarum. Og tað kann heldur ikki loysa seg, at sjúkrahúsið verður nýtt til røktarheim, staðfestir heilsumálaráðharrin.

# Rósa Samuelsen hevur onga loysn



*Rósa Samuelsen dugir ikki at síggja nakra loysn til trupulleikan beinanvegin, men heldur, at kommunurnar ikki hava gjørt nokk*

**Hóast tað vísir seg sum ein stóran trupulleika, at frísk fólk liggja á Landssjúkrahúsinum, hevur Rósa Samuelsen onga bráðfeingisloysn til trupulleikan, men hon arbeiðir við málinum. Serliga Suðurstreymur megnar ikki at nøkta tørvin. Halla Samuelsen vísir á, at landið ikki hevur verið serliga hjálpsamt**

HEILSUVERK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Sambært Rósu Samuelsen, ber ikki til hjá henni at loysa trupulleikan við, at so nógv liðugt viðgjørd fólk liggja á Landssjúkrahúsinum. Tað ber heldur ikki til at nýta barakkina til eina tílíka loysn.

- Vit kunnu ikki fara í barakkina nú, tí hetta er ein gomul avgerð, sum er ein partur av útbyggingini av Landssjúkrahúsinum. Og tað kann eg ógjørligt fara at broyta, sigur Rósa Samuelsen. Hon hevur somuleiðis hug at brigsla kommunum fyri hendan trupulleikan, tí serliga Suðurstreymur hevur alt ov fá røktarheimspláss.

Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd hjá Tórshavnar kommunu, kennir væl til trupulleikan og harmast almikið, at støðan er soleiðis, at Tórshavnar kommuna ikki megnar at nøkta tørvin við røktarheimsplássum. Tó heldur hon, at landið hevur gjørt ov lítið fyri at hjálpa til, soleiðis, sum tey eiga at gera. Hon leggur somuleiðis dent á, at Tórshavnar kommuna fleiri ferðir hevur biðið um at sleppa at yvirtaka eldraøkið, og hava fingið noktandi svar hvørja ferð.

- Eg haldi ikki mann skal ganga og skylda uppá hvønn annan, men kanska hevur landið prioritera skeivt í hesum førinum, sigur Halla Samuelsen. Sum tó greiðir frá, at landið hevur játtað 12 milliónir til røktarheimið á Boðanesi.

### Langtíðarloysnir ávegis

Hóast Rósa Samuelsen onga loysn hevur til trupulleikan á Landssjúkrahúsinum beint nú, nevnir hon fleiri langtíðarloysnir, sum eru ávegis.

- Um eina tíð vera tilsamans 72 nýggj røktarheimspláss klár, og av hesum vera 24 í Suðurstreymi, har tørvurin er størstur. Vónandi kann hetta verða við at loysa støðuna á Landssjúkrahúsinum, greiðir Rósa Samuelsen frá. Mann fær nokk ongantíð nøktað tørvin heilt, men meiningin er sjálvandi, at fólkini fáa tað, tey hava tørv á.

Sambært Rósu Samuelsen, er tað ein trupulleiki, at hon hevur ov lítla játtan, til at kunna loysa trupulleikan. Men samstundis er politiski viljin, at kreppan ikki skal ganga útyvir borgaran.

- Mann hevur í fíggjarlógini fingið nøkur ting uppá pláss. Eg kann játta Nærverkinum pening, so tey betri fáa loyst trupulleikan, men eg fái ikki flutt peningin júst, sum eg vil, greiðir almannamálráðharrin frá. Hon hevur sitið saman við Nærverkinum seinastu dagarnar, fyri at finna útav, hvussu peningurin verður best býttur á økinum hjá Nærverkinum, soleiðis at borgarin ikki fær eina verri tænastu.

### Arbeiða við fyribilsloysn

Landsstýriskvinnan í almannamálum greiðir somuleiðis frá, at tað hevði verið ynskiligt við eini fyribilsloysn, nú trupulleikin er so akuttur. Tó veit hon ikki heilt hvussu hetta skal gerast, men hon leggur dent á, at hon er í støðugum samskifti við Nærverkið. Umframt, at hon og Hans Pauli Strøm, skulu tosa saman um tingini. Tí mann ikki kann gera nakað tilvildarliga fyribilsloysn.

Spurd um tað ikki hevði verið lættari, um eitt landsstýrisfólk til bæði ráðini hevði verið betri til júst hendan trupulleikan, noktar hon blankt.

- Eg og Hans Pauli Strøm hava eitt gott samstarv, og vit hava fleiri felagsfunktiónir, so eg dugi ikki at síggja nakran trupulleika, sigur Rósa Samuelsen.

### Rætting

Tá Sosialurin skrivaði um Landssjúkrahúsið megnaðu vit at fáa 4000 ferðir 3000 at geva 1,2 milliónir krónur. Hetta skal sjálvandi vera 12 milliónir krónur, sum Landssjúkrahúsið nýtir, til at hava frísk fólk liggjandi á Landssjúkrahúsinum.